





Marine Harvest er størsta alifelag í heiminum, og verður triði hvør aldur laksur framleiddur í einum Marine Harvest felag. Í Føroyum rekur Marine Harvest 4 alibrúk og eina smoltstøð, og framleiða vit 6.000 tons av laksi um árið.

## Starvsfólk til planlegging og logistik á Marine Harvest Faroes

Vit hava tørv á einum persóni til søludeild okkara. Tú skalt taka tær av planlegging av sølu til keyparar okkara í útlondum.

**Uppgávan kann býtast upp í:**

**Planlegging:**
- har samskift verður við kryvjivirkið, um hvussu laksurin skal pakkast.
- at halda skil á, hvussu nógv skal seljast ímun til framleiðslu.

**Logistik:**
- Samskiftast skal við flutningsfeløg og kundar um, hvussu fiskurin skal flytast úr Føroyum fram til kundan.

**Pappírir:**
- Tá ordrar eru pakkaðir, skulu fakturar gerast til kundan. Verður laksurin seldur uttanfyri ES, skulu eisini onnur flutningspappírir útfyllast.

**Søla**
- Tú skalt hjálpa til at samskifta við keyparar, selja, áseta prísir og optimera flutningskostnað. Halda skil á saldo og tryggingum hjá kundanum.

Samskift verður við telduposti, Skype og telefon.

**Førleikar**
- Teldukunnleika til Office forritini. Enskt er eitt krav, tí samskift verður við kundar á enskum máli. Tú skalt vera skjót/ur til tøl, megna at taka skjótar avgerðir og arbeiða sjálvstøðug/ur.

**Útbúgving: Miðnám.**

**Umstøður**
- Arbeiðsplássið verður á Bryggjubakka í Havn. Fartelda og fartelefon eru amboðini, tú skalt brúka. Vit sóknast eftir einum persóni, sum kann arbeiða skeivar tíðir.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einari altjóða fyritøku, har tú fært møguleika til at arbeiða í fleiri mentanum í senn.

Umsóknir skulu sendast inn skjótast gjørligt og í seinasta lagi 10. november. Viðkomandi skal byrja beinanvegin. Løn sambært avtalu. Umsóknir skulu sendast til Hans Jákup Mikkelsen, søluleiðara á telduposti: hjm@marineharvest.fo. Um tú hevur tørv á at vita meira um starvið, so ring til mín á 791001.

www.marineharvest.com

marineharvest
excellence in seafood